STUTT SAGT

## Gudstænasta við kvirru á Glyvrum



*Náttargudstænasta verður í Glyvra kirkja fríggjakvøldið kl. 22*

**Fríggjakvøldið kl. 10 verður enn ein náttargudstænasta hildin í Glyvra kirkju. Slík gudstænasta varð fyrstu ferð hildin fyri einum ári síðani.**
**- Við hesa gudstænastuna var undirtøkan sera góð. Nú verður hon so aftur, sigur Meinhard Bjartalíð, sóknarprestur í Lamba.**

GUDSTÆNASTA
*Snorri Brend*

**Glyvrar:** Undir gudstænastuni í annaðkvøld verður sálmasangur og bíbliulestur – og kvirra.

Júst hetta við kvirruni hevur sermerkt tær tónleika-andaktirnar, sum hava verið fyriskipaðar í prestagjaldinum hesi seinastu seks árini.

Undir kvirruni fríggjakvøldið fer tó at ljóða ein stillur, meditativur urgutónleikur í kirkjuni í nakrar minuttir.

– Hesa løtuna kunnu fólk so biðja ein bøn, ella tey hugsa um bíbliutekstirnar, sum tey júst hava hoyrt.

– Tey kunnu eisini lata kirkjurúmið tala, ella savna hugnámini frá degnum, sum skjótt er at enda komin, greiðir Meinhard Bjartalíð frá.

### Kertur og bønir

At gudstænastan verður skipað nú fríggjakvøldið kemst av at hetta er kyndilsmessa.

Kyndilsmessa varð hildin til minnis um vitjanina hjá Mariu Moy í halgidóminum eftir føðingina. Til minnis um hetta og til heiðurs fyri Jesusbarnið vóru kertur og kyndlar tendrað.

Undir náttargudstænastuni, sum byrjar kl. 22 verða sjey ljós tendrað, - eitt fyri hvørja bøn, sum leikfólk fara at lesa upp.

Við gudstænastuna fer eisini Kór glyvra kirkju at syngja 23. sálm eftir Dávidi. Kórið hevur lagt seg eftir at syngja Dávidssálmar í gomlum enskum og resiterandi stíli, og tað fær so kirkjufólkið møguleika at hoyra hetta kvøldið.

Umframt kórið fer eisini ein kvinnutrio at syngja.´

# Eiðisbørn nýggjan barnagarð



*Planeringin av økinum til barnagarðin er longu gjørt. – Tíðin krevur slíkar loysnir, sigur Tordur Niclasen, formaður í mentanarnevndini í Eiðis kommunu*

**Um gott eitt ár sleppa børnini á Eiði í ein nýggjan barnagarð. Á bygdaráðsfundi í gjárkvøldið varð samtykt at fara undir ein slíkan barnagarð, sum kemur at hýsa 66 børnum.**

BARANANSING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Eiði:** – Við hesum nýggja barnagarðinum fara vit at kunna veita borgarunum enn eina tænastu, sigur Tordur Niclasen, formaður í mentanarnevndini í Eiðis kommunu.

Í mong ár hevur verið arbeitt við eini slíkari ætlan, men fyrst um eitt ár verður hetta málið umsíðir loyst úr lagdi.

Tordur Niclasen er fult greiður um, at mong kanska hava ótolnast eftir eini slíkari loysn. Men tað hevur eisini havt sína orsøk:

– Vit valdu at bíða til tær fíggjarligu fortreytirnar vóru til staðar. Og tað eru tær altso nú.

– Okkara kommuna skal framvegis verða væl stýrd. Tí ynsktu vit ikki at lána okkum út á sjógv, men fremja arbeiðið nú fíggingin er tøk, sigur Tordur við Sosialin.

Á fundinum í gjárkvøldið tók bygdaráðið av einum tilboði frá Fjarðahúsum í Kollafirði um bygging av barnagarðinum.

Hann verður umleið 650 fermetrar stórur og kostar 8 mió kr., tá alt er íroknað.

Nýggi barnagarðurin á Eiði kemur at standa á einum øki tey nevna niðri á Hólmanum.

Á hesum øki er sjálv planeringin longu gjørd, og tí er klárt hjá teimum í Fjarðahúsum at fara undir arbeiðið sum skjótast.

### Gott tilmæli

Arbeiðið við at fyrireika barnagarðin á Eiði hevur annars vart í nøkur ár.

Tað byrjaði við at ein arbeiðsbólkur varð settur at fyrireika ein slíka bygging. Bólkurin kom við einum sera væl úr hondum greiddum tilmæli, og nú verður tað so veruleiki.

Hesin arbeiðsbólkurin mælti eisini til at leggja barnagarðin niðri við Hólmarnar.

Og tað hevur bygdaráðið eisini tikið til eftirtektar.

Í nánd av nýggja barnagarðinum er sambýlið Korndalsbýlið, og tí fær ein her helst møguleika fyri einumhvørjum samstarvi í framtíðini.

Sum skilst er ætlanin at bjóða verandi dagrøktarum á Eiði arbeiði á nýggja stovninum.

### Trekkplástur

Á Eiði hevur barnaansingin altíð havt høga raðfesting, og tí er bíðilisti eftir ansingarplássi eitt ókent fyribrigdi. Hetta stigið við barnagarðinum er enn eitt stig á hesi somu leið.

Kommunan seldi herfyri fleiri grundøki í Svínáum, og fyrireikar í løtuni útstykkingar bæði á Eiði og í Svínáum, ið eisini er partur av Eiðis kommunu.

– Tað eru nógv sum spyrja seg fyri um grundøki í kommununi og samstundis fregnast eftir, hvussu er við barnaansingini.

– Eingin ivi er um, at tíðin krevur ein slíkan barnagarð. Hetta fer helst at verða eitt eyka trekkplástur fyri Eiðis bygd, sigur Tordur.

# Endurreisa gomlu gróthúsini

**Í nøkur ár hevur Bygdar- og Fornminnafelag í Elduvík arbeitt við at endurreisa nøkur gróthús í bygdini.**

MENTAN
*Snorri Brend*

**Elduvík:** Nú hevur Bygdar- og Fornminnafelagið eisini fingið stuðul frá kommununi til ætlanina.

Á býráðsfundi í Runavíkar kommunu í farnu viku, har Elduvík er partur av, varð samtykt at lata stuðul til ætlanina.

Íalt letur kommunan 75.000 kr. til hesa spennandi ætlanina um at varðveita og endurreisa trý gróthús í eystara parti av bygdini.

Á staðnum er longu nú hongt upp eitt kort, sum lýsir hvussu nógv gróthús vóru her í gomlum døgum.

Samstundis við hetta er ætlanin at menna felagið og at geva tí møguleikar at virka í framtíðini.

Frammanundan býráðsfundinum hósdagin hevði mentanarnevndin í Runavíkar kommunu havt málið til viðgerð.

Nevndin mælti til at veita stuðulin. Og tað gjørdi býráðið eisini!



*Gróthúsini í Elduvík eru verd at varðveita*

*Mynd: runavik.fo*